# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stóra royndin


*Fyri tveimum vikum síðani vann Kyndil steypakappingina við finalusigri á StÍF. Verður tann sigurin endurtikin sunnudagin, kann Kyndil koma nógv nærri eini FM-finalu móti júst StÍF*

**Vinnur Kyndil heimadystin móti StÍF sunnudagin, hava teir góðar fortreytir fyri einum finaluplássi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað líkist sannleikans tíma í føroyskum manshondbólti sunnudagin. Tá verður endurtøka av steypafinaluni, og har vil StÍF helst prógva, at talan var um ein svipsara hjá teimum fyri tveimum vikum síðani.

Hjá Kyndli stendur hinvegin meira upp á spæl. Trupli útidysturin í Vestmanna varð vunnin mikukvøldið, og tí eru teir enn við í dystinum um pláss í FM-finaluni. Somikið væl við, at eydnast teimum at basa strandingunum sunnudagin, kann væl vera, at talan verður um reella hálvfinalu, tá Kyndil tann 9. mars spælir grannauppgerð móti Neistanum.

### Ikki ráð at kiksa

Júst Neistin spælir eisini í Havn um vikuskiftið. Teir taka móti VÍF leygardagin í einum dysti, sum teir bláu als ikki hava ráð at tapa. Seinastu mánaðirnar hevur Neistin sýnt rættiliga óstøðugt spæl, men nú Kyndil av álvara nærkast, eru teir bláu í vanda fyri at missa finaluplássið. Og skal tann vandin ikki gerast enn størri, hevur Neistin snøgt sagt ikki ráð at tapa leygardagin.

Seinasti dysturin hjá monnum hetta vikuskiftið verður í Kollafirði, har KÍF tekur móti H71.

# Neistin vil ájavnt við VB



**Vinnur Neistin sín dyst móti VÍF, eru stór sannlíkindini, at tær vinna seg ájavnt VB**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við sigrinum á VB mikukvøldið hildu Neistakvinnur fast í vónini um at spæla seg í FM-finaluna móti Stjørnuni.

Leygardagin hevur Neistin møguleika at koma ájavnt VB á øðrum plássi, um tær bláu vinna sín heimadyst móti VÍF.

Og sannlíkt er, at tær verða verandi ájavnar VB, hóast VB hevur dyst sunnudagin. Hesin er nevnliga tann truplast møguligi – á útivølli móti Stjørnuni.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður í Havn sunnudagin, har Kyndil eigur heimavøll móti StÍF.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 23.02 | 14.30 | Neistin-VÍF |
| 24.02 | 14.30 | Kyndil-StÍF |
| 24.02 | 15.00 | Stjørnan-VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 23.02 | 16.00 | Neistin-VÍF |
| 24.02 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 24.03 | 16.00 | KÍF-H71 |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 24.02 | 14.00 | Fleyr-SÍ |
| 24.02 | 14.00 | ÍF-Dráttur |
| 24.02 | 15.00 | TB-KÍF |